# Heðin og havnarfólk fegna



Heðin Mortensen vísti á, at Smyrlarnir seinastu góðu 100 árini hava verið fastur partur av býarmyndini í Havn

**Tá Smyril leygardagin kom á Havnina, hugtók hann fólkini, sum tóku ímóti. Stásiliga skipið bergtók sanniliga tey, sum vitjaðu umborð**



*Av molanum í Havn var fýrverk skotið til heiðurs fyri nýggja Suðuroyarskipinum*

NÝGGI SMYRIL
*Dagfinn Olsen*
*Dagfinn@sosialurin.fo*

Nýggi Smyril kom á Havnina leygarmorgunin – eins og tá hann kom á Krambatanga á Tvøroyri, og suðuroyingar sluppu at vitja umborð, so hugtók stásiliga skipið í dag tey, sum komin vóru á bryggjuna í Havn og eisini sluppu at vitja umborð.

Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, fegnaðist eisini, og í røðu síni ynksti hann skipinum vælkomnum og Strandferðsluni tillukku við skipinum.

– Somuleiðis ynskja vit í kommununi skipara og manning at vera hjartaliga vælkomin at bryggju í Havn. Eg má siga, at tað var ein ótrúliga vøkur og hugtakandi sjón at síggja Smyril koma inn um Glyvursnes og fram við Argjalandinum á síni jomfrúferð norður um Suðuroyarfjørð. Vit norðanfjørðs hava bíðað í so leingi eftir at síggja nýggja flaggskip okkara í samferðsluflotanum. Vit hava hoyrt nógv føgur orð um skipið, men tess størri er gleðin, nú dagurin loksins er komin, segði Heðin Mortensen m.a. í røðu síni.

– Heimstaðurin hjá Smyrli er á Tvøroyri, men vit í Havn gleðast eisini um skipið og vilja fagna tí. Og tað er ikki so løgið, tí teir undanfarnu Smyrlarnir hava sanniliga verið partur av gerandisdegi okkara í Havn. Hin »gamli«, sum nú verður tikin úr rutu, hevur sett sín dám á býarmyndina og virksemið her á havnarlagnum í eina fjórðingsøld. Hann hevur trúliga stevnt inn og út um Molan í øllum veðri hvønn dag í vikuni øll hesi árini, segði Heðin Mortensen.

– Fram til fyrru helvt av 1970-árunum var bryggjan her við Eystaruvág miðdepilin í siglingini innanoyggja. Mangan var trongligt, tí tá komu at kalla øll til Havnar sjóvegis. Her komu og fóru ferðafólkini. Her lossaðu og lastaðu

# Eitt skarvslop inn í framtíðina

**– Við hesum skarvslopum inn í framtíðina á samferðsluøkinum er slóðað fyri mening og trivnaði runt oyggjarnar. Í dag hátíðarhalda vit so stórstu íløgu nakrantíð á Oyggjaleiðunum hjá SL. Íløgan, sum skal tengja Suðuroynna nærri at meginøkinum. Íløgan, sum vónandi fera at javnseta Suðuroynna við oyggjarnar norðanfjørðs**

NÝGGI SMYRIL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Bjarni Djurholm hugleiddi um framtíðar samferðslumøguleikarnar*

Bjarni Djurholm helt dagin vera stóran fyri føroyingar sum heild og serstakliga fyri tey, sum javnan ferðast á Suðuroyarleiðini, nú nýggi Smyril umsíðir var komin til Havnar. Hann vísti á, at hetta nýggja og stásiliga skipið er eitt úrslit av drúgvum fyrireikingum og einum megnar arbeiði hjá fyrst og fremst Strandfaraskipum Landsins, men eisini politiskum myndugleikum og privatum ráðgevum.

– Fyrstu fyrireikingarnar til hesa stóru verkætlan byrjaðu fyri sjey árum síðani, og ikki minni enn tríggir ymiskir landsstýrismenn og tveir ymiskir stjórar á Strandfaraskipum Landsins hava haft ábyrgdina av verkætlanini. Fyrireikingarnar til hesa verkætlan byrjaðu longu í 1998, tá søkt varð um játtan til prosjektering á fíggjarlógini fyri 1999.

Hann segði, at ein arbeiðsbólkur varð settur á Strandfaraskipum Landsins at greina hvørji krøv, nýggja suðuroyarskipið skuldi lúka, og lat hesin arbeiðsbólkur eina frágreiðing frá sær í september 1999. Verkætlanarbólkurin varð seinni víðkaður við umboðum úr Suðuroy eisini.

Tilfarið frá verkætlanarbólkinum gjørdist høvuðsgrundarlagið undir tí prosjektering, sum ráðgevandi verkfrøðingarfelagið Knud E. Hansen kom at standa fyri.

– Eg kann í hesum sambandi nevna, at Knud E. Hansen eisini prosjekteraði gamla Smyril, sum nú eitur Smyril I. Eisini hevur henda fyritøka staðið fyri projektringini av donsku sjóverjuskipunum, sum sigla um okkara leiðir, og ikki er sørt, at skapið av sjóverjuskipunum sæst aftur í nýggja Smyrli, segði Bjarni Djurholm.

Hann segði eisini, at verkætlanin varð í oktober 2001 bjóðað út millum 20 skipasmiðjur úr øllum heiminum. Tá avtornaði, hevði skipasmiðjusamtakið IZAR í Spania besta boðið, og farið varð í samráðingar við skipasmiðjuna við tí endamáli at gera ein sáttmála um bygging.

Til at snikka sáttmálan saman útvegaði SL og Vinnumálaráðið sær hjálp frá nøkrum av kønastu serfrøðingunum innan økið, m. a. Maersk Broker og bæði altjóða og føroyskum advokatum.

– Eg fekk sjálvur tann heiður at undirskriva sáttmálan við IZAR tíðliga á vári 2002. Og havi eg í byggitíðini tí havt høvi at fylgja byggingini og vitja IZAR-skipasmiðjuna nakrar ferðir. Hetta hevur verið stak áhugavert og hevur givið innlit í ta byggisamskifti, sum er neyðugt í slíkari stórverkætlan.

– IZAR-skipasmiðjusamtakið kom tíverri í andróður mótvegis ES-myndugleikunum um tað mundið, tá Smyril var farin av bakkastokki. ES-myndugleikarnir áløgdu skipasmiðjusamtakinum bót upp á fleiri milliardir fyri fjaldan stuðul og vandi gjørdist fyri, at skipasmiðjan í San Fernando, har Smyril varð bygdur, fór at vera afturlatin.

Hetta hevði við sær arbeiðssteðgir og verkføll sum gjørdu, at handanin av Smyrli kom í drag. Nógv samskifti var síðani millum SL og IZAR sum hepnaðist væl, og standa vit í dag við einum skipi, sum kann sigast at vera eitt verdugt flaggskip í flotanum hjá Strandfaraskipum Landsins, og enntá til ein lægri kostnað, enn ásett í verklagslógini, segði hann.

Bjarni Djurholm helt at gongdin í málinum farna árið vísir greitt, hvussu týdningarmikið tað er, at forarbeiðið í slíkum verkætlanum verður gjørt til lítar, ikki minst tá trupulleikar stinga seg upp í byggitíðini.

– Hóast summi í síni tíð hildu, at komið var nakað seint í gongd, so frøist eg um í dag, at SL og Vinnumálaráðið nýttu neyðuga orku til fáa til vega sáttmála, sum seinni vísti seg at hava avgerandi virði.

– Eitt gott forarbeiði er tó einki vert, um ikki eftirlitið við verkætlanini verður gjørt til lítar, og tað haldi eg at Strandfaraskip Landsins hava klárað til UG, segði Bjarni Djurholm.

– Eg fari at nýta hetta høvið at rósa teimum fólkum á Strandfaraskipum Landsins, sum hava verið involverað í byggingini av nýggja Smyrli, herundir fyrireikingarbólki, byggieftirliti og ikki minst leiðsluni, sum hevur tikið eitt megnartak í sambandi við hesa verkætlan.

– Nýggja skipið viðførur eitt skarvslop í tænastustigi á farleiðini. Skipið siglir skjótari, hevur størri kapasitet og komforturin er betri. Sum Landsstýrimaður í vinnumálum fegnist eg eisini um bøttu umstøðurnar hjá vinnuni á Suðuroyarleiðini, sum ikki hava haft ov góð kór seinastu árini.

Eitt sum mær dámar so serstakliga væl við nýggja Suðuroyarskipinum er sniðið. Tað líkist einum ordiligum skipi, um man kann siga tað soleiðis. Tað er ikki so løgið, at fyritøkan, sum teknaði skipið, Knud E. Hansen, hevur brúkt tekningarnar av nýggja Smyrli í kunningartilfari um fyritøkuna. Nýggi Smyril er eitt sera snøgt skip, segði Bjarni Djurholm.

### Stór menning á samferðsluøkinum

Seinastu fimm árini eru samferðsluviðurskiftini og -møguleikarnir broyttir radikalt til tað betra. Nýggja Sandoyarferja er tikin í nýtslu, fast samband er til Vágarnar, í dag taka vit móti nýggjum Smyrli til Suðuroyar og um hálvt ár fast samband til Klaksvíkar.

Og um ikki so langan tíð verður klárt at taka politiska støðu til fasta sambandið til Sandoyar umframt, at vit um eitt ár ella so fara at leingja flogvøllin í Vágum.

– Við hesi gongd nærkast vit degnum, har nærum allir føroyingar kunnu flyta seg millum bygdir, tá teir vilja eftir egnum ynski. Fyri bert tíggju árum síðani hevði hetta verið at rokna sum ørvitistos.

_ Við hesum skarvslopum inn í framtíðina á samferðsluøkinum er slóðað fyri mening og trivnaði runt oyggjarnar. Í dag hátíðarhalda vit so stórstu íløgu nakrantíð á Oyggjaleiðunum hjá SL. Íløgan, sum skal tengja Suðuroynna nærri at meginøkinum. Íløgan, sum vónandi fera at javnseta Suðuroynna við oyggjarnar norðanfjørðs.

Við vón um, at hetta fer at hepnast fari eg at ynskja okkum øllum tillukku við skipinum blíðan byr framyvir, segði Bjarni Djurholm.